www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 07 - 2013

# 6 oljufeløg millum heimsins 10 størstu fyritøkur

Heili 6 oljufeløg teljast millum 10 tær størstu fyritøkurnar í heiminum. Og ovast liggur Royal Dutch Shell. Hetta vísir yvirlit frá Fortune Global 500, skrivar heimasíðan World Oil and Gas. Yvirlitið vísir 500 tær størstu fyritøkunar í heiminum í dag innan øll øki. Tað vísir seg, at tað eru fyritøkur innan orku, tøkni og fígging, sum teljast millum tær størstu bæði tá talan er um inntøku og vinning. Á hesum listanum eru 40 olju- og gassfyritøkur. Í yvirlitinum sæst, at Shell liggur á odda, síðani kemur handilsketan Wal-Mart Stores, og eftir hana koma fleiri oljufeløg á rað, ExxonMobil, sum eru partur av leitingini í Føroyum, Sinopec Group, China National Petroleum og BP. Sum nr. 10 liggur enn eitt oljufelag, Total. Áhugavert er eisini at merkja sær, at norska Statoil, sum stendur á odda fyri oljuleitingini í Føroyum, og hevur havt stóra framgongd seinastu árini, eitt nú við einum føroyingi í høgum stjórasessi og rúgvu av øðrum føroyingum í arbeiði, liggur á einum 39. plássi og er harvið største fyritøkan í Norðurlondum. Maersk, sum í okkara eygum, er ein risafyritøka, liggur heili 120 pláss aftan fyri, á einum 159. plássi. Hyggja vit eftir vinninginum hjá feløgunum, liggur amerikanska ExxonMobil á odda og næst tí kemur Apple. Rank Company Revenues ($b) Profits ($mm) 1 Royal Dutch Shell 481.7 26.6 2 Wal-Mart Stores 469.2 17.0 3 Exxon Mobil 449.9 44.9 4 Sinopec Group 428.2 8.2 5 China National Petroleum 408.6 18.2 6 BP 388.3 11.6 7 State Grid 298.4 12.3 8 Toyota Motor 265.7 11.6 9 Volkswagen 247.6 27.9 10 Total 234.3 13.7